# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30: Samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 verður møti, har Símin Ósá, trúboðari í Grønlandi, talar. Eingin sunndagsskúli vegna heystfrí.
www.hebron.fo

**Sjómanskvinnuringurin**
á Sjómansheiminum í Tórshavn kemur saman mánakvøldið 18. okt. kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Frelsunarherurin**
*Tórsgøta 19, Tórshavn*
Sunnudagin kl. 11.00: Halgunarmøti. Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn.
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Mánadagin kl. 17.00 og kl. 19.00: Skótamøti.
Í sambandi við 80 ára jubileum verður framsýning av myndum og øðrum í salinum frá týsdegi 19.okt. til fríggjadagin 22. okt. kl. 10.00–13.00 og kl. 15.00–19.00.
Leygardagin 23.okt. kl. 10.00–13.00: Kaffisøla og fiskibrunnur, har øll vinna.
Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudag
kl. 10.00: Breyðbróting.
kl. 12.00: Sunnudagsskúli.
kl. 18.00Ø Evangeliskt møti.
Talarar: Jørundur Hansen og Símun Ósá greiða frá um Grønlandi. Øll eru vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa í Mariukirkjuni v/ William Kenny, biskupi.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Reimund Langgaard.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin 19. okt. kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týskvøldið 19. okt. kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantafest.
Holdini hjá Hera Joensen í Vesturkirkjuni og Bergur Debes Joensen á Argjum.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag einki ungdómsmøti.
Í morgin landsbøn kl. 17.00.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Bergur Skovgaard, kl. 11.50: Sunnudagsskúli og einki ABC, kl. 16.00: Samkomufundur
Mánadagin kl. 20.00: Útfríanarmøti v/ Peter Holmsgaard.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-frí frá 8-16.
www.filadelfia.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl 14.00: Sunnudagsskúli, vitnimøti kl. 18.00.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti. Mikumorgun kl. 07.00: Bøn.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Johann Henriksen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron í Vestmanna**
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 18.00. Jónar og Joanita Jakobsen fyristøðupar í Kalundborg í Danmark luttaka og greiða frá arbeiði teirra. Náttturði verður aftaná.
Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli og møti kl. 18.00 í kjallaranum við luttøku frá Dansk Bibel Institut.
Vikuskiftið 23.-24.oktober verða vikuskiftismøti í samband við at salurin verður tikin í nýtslu aftur.

**Norðskála kirkja**
Emil Olsen, prestur, heldur fyrilestur í møtisalinum í Norðskála kirkju sunnukvøldið kl. 19.00. Evni: Enska kirkjan.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið verður ungdómsmøti kl. 21.00.
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og kl. 18.00 verður møti.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00: Breyðbróting.
Á møtinum kl. 18.00 verður dópur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin: Sunnudagsskúli kl. 14.00. Møti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan í Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00: AWAKE.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11.00.
*Vælkomin í Kelduna.*

**Missiónshúsið í Skopun**
Ongin sunnudagsskúli sunnudagin vegna heystfrí.
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn- & lovsangsløta.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania í Skopun**
Fríggjakvøldið kl. 20.00: Møti v/ Bergur Skovgaard. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Kvøldmøti.
Øll eru vælkomin.

**KFUM&K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl.22.00: Opið hús.
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli. Kl.17.30: Bønarløta. Kl.18.00: Møti við Hjørleif Poulsen. Kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti.
Sunnudagin kl.13.30 er sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Soli Deo Gloria**
Fríggjakvøldið kl. 20.00: Møti.
Leygardagurin:
kl. 10.00: Sangur og lovprísan.
kl. 15.00: Møti.
kl. 20.00: Møti.
kl. 23.00: Ungdómskvøld.
Sunnudagin:
kl. 10.00: Sangur og lovprísan.
kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
kl. 15.30: Møti.
kl. 18.00: Møti.
Telefon bønartænastan, 456514, svarar allar stevnudagarnar.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Soli Deo Gloria mikukvøldið 20.okt. kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.
*Nevndin*

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Møti verður sunnukvøldið 17. oktober kl. 18.00 við Snorra Brend.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
Sunnukvøldið 17. okt. verður familjumøti kl. 18.00 við talu, sangi og eisini verður sungið saman við børnunum.
Aftaná verður nátturði í kjallaranum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna heystfrí.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Katrin Mortensen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bethel, Vágur**
Møti verður í kvøld og leygarkvøldið kl. 20.00. Poul Færø og Eyðfinn Reyðberg tala.
Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Aglow, Suðuroy**
Fundur verður leygarkvøldið kl. 20.00 í hølunum hjá Frelsunarherinum í Vági. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Frelsunarherurin í Vági**
Fríggjadagin kl. 17.00: Barnamøti.
Leygardagin kl. 17.00: Barnamøti.
Leygarkvøldið kl. 20.00: AGLOW hevur møti.
Sunnudagin kl. 17.00: Familjumøti v/ Magnus Jensen og øðrum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti.
Mánakvøldið kl. 21.00: Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Dorthe Gyldenkærne heldur fyrilestur um sjálvsmenning, »Frá dunnuunga til svan«, mánakvøldið 18. okt. kl. 19.00.

**Fólkaheilsuverkætlanin í Vági**
Sigla og rógva í grindabátum í Vági, hvønn leygardag kl. 14.00. Tiltakið er ókeypis. Veðrið avger hvar farið verður og hvussu leingi túrurin varir. Aftaná túrin leygardagar fæst drekkamuður og okkurt gott afturvið til keyps á Hotel Bakkanum. Uppmøting á Kunningarstovuni í Vági.

**Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR**
Leygardagin 16. oktober verður lættur túrur til Nólsoyar, har vitjað verður Nólsoyar bygd og kirkju. Farið verður við Rituni av Bursatanga kl. 15.15 og heim aftur úr Nólsoy kl. 18.25. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.-13.30 v/ Anne Grete Harlou, tilm. tlf. 316491**
*Fríggjadagin 15. oktober*
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
*Møguleiki er at koma við sum gestur.* Tilmelding mánadag á tlf. 316491.
kl. 13.00–17.00: Opið hús.
***7. oktober kl. 11.00–11.45 verður byrjanarskeið í eingilskum talumáli. Tilmelding á tlf. 316491.***

***Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.00-13.30***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl 13.00.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Daghilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
Fríggjadagin 15. okt.: Opið hús.
*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Ørkin í Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøldið kl. 20.30.
Leygarkvøldið 6. nov.: Hugnakvøld v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Sunnudagin 7. nov. kl. 15.00: Gudstænasta í Háteigskirkju v/ Bjarna Bæk, dómprósti. Aftaná verður kaffi á Ørkini.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

## Gullbrúdleyp
Sunnudagin 31.10.04 hava hjúnini Oda og Mads Hentze, Skopun, verið gift í 50 ár.
Dagurin verður hildin í Meinigheitshúsinum í Havn leygardagin 30. oktober kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 361502, 361065 ella 310381 innan 18. okt.

## 90 ára føðingardagur
Týsdagin 19. oktober fyllir Jóhannes Miðberg, Vestmanna, 90 ár.
Dagurin verður hildin saman við børnunum.



Lindin

*Leygardagin kl. 17.00:*
## Sjómansendingin Vitin
Vit halda áfram við at hoyra um okkara stoltleika Norrönu. Hesuferð hava vit samrøðu við Maskinstjóran, Poul Nolsøe Laksafoss úr Klaksvík. Hann sigur frá lívið sínum, hvørji skip hann hevur verið við, og um tá ið hann kom umborð á gomlu Norrønu. Hann er fegin og stoltur av at tað eydnaðist Smyril-Line at ogna sær nýggju Norrønu, og vónar saman við restini av manningini at tað eydnast at halda skipið í Føroyum.
Leiðarin á skipsdeildini hjá Smyril-Line Áki Jespersen, heldur áfram at greiða frá hvussu væl alt er bygt upp og virkar, fyri at ferðafólkini skulu hava tað so gott sum tað einaferð ber til.
Vitin er aftur at hoyra sunnudagin kl.15.00 og hósdagin kl.16.00
Vertur er Símin Hansen.

ÚF

*Leygardagur kl. 19.05*
## Á Quiztinum
Útvarpið fer í vetur undir eina nýggja spurnarkapping, har ætlanin er at fólk, ið á ymiskan hátt hava gjørt vart við seg, fara at mynda bólkarnar, sum í hvørjari sending verða tveir í tali.
Spurnarkappingin, ið verður send leygarkvøld kl. 19.05, verður skipað eftir kupleisti. Talan gerst sostatt um 8 innleiðandi umfør, 4 fjórðingsfinalur, 2 semifinalur og 1 finalu.
Í hvørjari sending hittast tveir bólkar við hvør sínum tveimum luttakarum.
Spurningarnir snúgva seg um bæði føroysk og útlendsk viðurskifti, eitt nú skipasøgu, tónleik, nútíðarsøgu, árstøl, ítrótt, umframt nakrar øðrvísi uppgávur.
Gunnar Nolsøe leggur til rættis

*Sunnudagur kl. 14.15*
## Mikkjalsmessudagur í Porkeri
Í hesi fyrsti sendingini á ferð kring landið hitta vit Hilmar Bech í Porkeri. Hann greiðir frá veðrahaldi í dag og í farnum tíðum, og ymsum øðrum áhugaverdum viðurskiftum.

*Hósdagur kl. 19.00*
## Tilvera: Profetar
Vit fara undir eina røð av sendingum, sum fara at skifta við Tilveru annað hvørt hóskvøld.
Tær snúgva seg um profetarnar í Gamla Testamenti. Í fyrstu sendingini tosa vit um sjálvt profethugtakið, og hvat vit í dag halda vera ein profetur.

ÚF
### Morgunlestrar
**18.–23. oktober**

***Sigurlaug Joensen á Skála lesur***
**Sálmar:**
**Mánadagin 18. oktober:**
nr. 541 Nú hvítna tindar fjøllum á
**Týsdagin 19. oktober:**
nr. 543 O, Guð, vár hjálp í farnu tíð
nr. 21 Algóði faðir! tú yndismilt bendir
**Mikudagin 20. oktober:**
nr. 545 Guð, tú sum ljósið lætst skína so bjart
nr. 22 Harrin signi oss og ráði
**Hósdagin 21. oktober:**
nr. 39 Tað, Guð mín vil, tað komi á
**Fríggjadagin 22. oktober:**
nr. 542 Á hall nú árið komið er
**Leygardagin 23. oktober:**
nr. 530 Syngið signing, syngið frið
nr. 405 Lat, o Guð, tín einglaskara

ONSDAGS LOTTO

**Vika 42 – 13. oktober**
Vinnaratøl: **04 - 26 - 28 - 36 - 44 - 46**
Eykatøl: **11 - 30**
Supertal hesa vikuna: **44**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **Eingin vinnari** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **81.593,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **3.723,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **116,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **38,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## GJALDOYRAKURSIR

*Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum*

| | | 13.10.04 | Ultimo sept. 2004 |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 606,3700 | 599,6900 |
| Bretland | **Pund** | 1083,9200 | 1083,5200 |
| Svøríki | **Króna** | 82,0700 | 82,1500 |
| Noreg | **Króna** | 90,4300 | 89,2200 |
| Sveits | **Frankur** | 481,1400 | 479,3600 |
| Ísland | **Króna** | 8,5100 | 8,4700 |
| Kanada | **Dollari** | 478,7500 | 472,7800 |
| Japan | **Yen** | 5,5136 | 5,4251 |
| | **Evra** | 743,8400 | 744,1600 |

FØROYA SPARIKASSI

# KROSSORÐ




## Vinnari:
***Heðin Hansen***
***410 Kollafjørður***

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: FORARGILSI

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| F | Y | L | L | S | K | A | P | U | R | | Á | T | | Í | F |
| J | | O | | Á | R | | L | | E | R | R | I | N | | Ø |
| U | N | G | U | R | | R | O | K | A | R | | L | E | I | R |
| R | Ó | A | R | | T | | | U | | R | O | T | O | R | I |
| T | A | R | A | S | T | Ø | Ō | | A | | R | A | | A | N |
| A | | | L | Á | | | | F | R | Í | Ō | K | A | | G |
| N | I | M | | M | O | R | T | A | N | | | S | | E | A |
| D | I | M | M | A | L | Æ | T | T | I | N | G | | F | U | T |
| I | | | A | L | S | | | | | G | R | Ø | R | | Í |
| 391 | S | E | R | | E | M | B | A | R | | E | N | Ø | | Ō |
| Á | L | I | N | | N | O | R | Ō | L | Ý | S | I | Ō | | I |
| V | | S | A | G | | N | Ú | | | | J | | I | N | N |
| Í | S | | | N | E | D | | B | Á | R | A | N | | I | D |
| S | O | S | I | A | L | U | R | I | N | | R | O | K | N | I |
| I | | D | A | G | B | L | A | Ō | I | Ō | | T | Ú | N | |
| N | Ú | P | | A | A | | K | I | | Ō | | A | R | A | N |

## Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).
Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.
Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

**392**

**Loysunarorðið:** ...................
Navn: ..........................
Bústaður: ......................
Bygd/býur: .....................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***